# Tann størsti trolarin siglir við segli



Maartje Throdora skal spara 10 prosent av oljuni við at brúka segl

Mynd: SkySails

**Tað størsta fiskiskipið í Týsklandi skal brúka vindorku fyri at spara olju**

SKIPARAKSTUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Í hesari vikuni leggur tann 15.000 bruttotons stóri trolarin Maartje Theodora frá landi í Niðurlondum, haðani hann fer út í Atlantshavið við kós ímóti Suðuramerika. Í sær sjálvum er tað ikki nøkur stórhending, men kortini er fráferðin serstøk, tí tann risastóri trolarin skal lutvíst sigla við segli fyri at spara olju.

Tey, sum standa aftan fyri verkætlanina, hava fingið stuðul frá ES, og málið er, at tey nútímans seglskipini skulu spara ein triðing av oljunýtsluni. So stór verður sparingin ikki umborð á Maartje Theodora. Eigararnir vóna, at skipið kann spara umleið tíggju prosent av oljunýtsluni við at brúka seglið á ferðini um Atlantshavið, tá veðrið er til vildar.

Seglið, sum er 160 fermetrar stórt, er fest í forskipið við einum 300 metrar longum kaðali. Eigararnir vænta, at tá veðrið er til vildar, kann segði geva trolaranum 1000 kW eyka megi, sum svarar til ein áttandapartav maskinorkuni hjá skipinum.

Trolarin Maartje Theodora er skrásettur í Týsklandi, men tað er niðurlendska felagið Parlevliet & Van der Plas, sum eigur skipið. Stjórin í felagnum, Diederik Parlevliet, sigur, at tann stóra avbjóðingin hjá manning og reiðaríi verður at kanna og skráseta, hvussu skipið fer at skikka sær, tá trolið er úti og seglið uppi.

Seglroyndir eru fyrr gjørdar við farmaskipum, men fyrireikararnir halda, at skipanin egnar seg betur til fiskiskip, sum ikki altíð sigla við fullari ferð eins og handilsskipini.

Útrokningar hjá umhvørvisverndarfelagsskapinum Seas a Risk vísa, at heimsins fiskiskip eiga umleið eitt prosent av heimsins oljunýtslu, og at tey lata meiri enn 130 milliónir tons av $CO_2$ frá sær um árið.

# Funnu 57 fiskasløg afturat í grønlendskum sjógvi

**Broytingar í náttúruni og nýggjar fiskiroyndir hava avdúkað, at tað eru nógv fleiri fiskasløg í grønlendskum sjógvi, enn fiskifrøðingarnir hava hildið**

FISKIRANNSÓKNIR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Í 1992 skrásettu fiskifrøðingar, hvørji fiskasløg hildu til í havøkinum kring Grønland. Nú hava teir skrásett av nýggjum, og úrslitið vísir, at ikki færri enn 57 fiskasløg eru komin afturat síðani kanningina fyri 18 árum síðani.

Tann nýggja kanningin, sum grønlendskir og danskir granskarar hava gjørt í felag, vísir, at nú eru 269 fiskasløg í grønlendskum sjógvi. Í 1992-kanningini vóru fiskasløgini 212 í tali, og granskararnir siga, at heitari sjógvur og meiri fiskiskapur á djúpum vatni eru orsøkin til, at so nógv fiskasløg eru komin afturat í skrásetingina hesi árini.

– Vit kunnu ikki siga, at tað er hitin í sjónum, sum hevur fingið tey nógvu fiskasløgini at leita sær til Grønlands, men vit kunnu í hvussu er vísa á fimm fiskasløg, sum eftir øllum at døma eru komin hagar, tí sjógvurin er vorðin heitari. Tað eru lakssild, hvítingur, kjaftsvartur kongafiskur, havtaska og sjóprónur, sigur Peter Rask Møller, sum arbeiðir í Zoologisk Museum í Keypmannahavn, og sum hevur staðið á odda fyri teirri nýggju skrásetingini.



*Peter Rask Møller stóð fyri arbeiðinum at skráseta fiskasløgini í grønlendskum sjógvi*

Mynd: Jyllandsposturin

**Ókend fiskasløg**

Tey 57 fiskasløgini, sum eru komin í ta seinastu skrásetingina, eru ikki »nýggj« í orðsins sanna týdningi. Peter Rask Møller sigur, at 47 av fiskasløgunum eru kend frá øðrum havleiðum, men at hetta er fyrstu ferð, at tey eru skrásett í grønlendskum sjógvi. Í hinum 10 førunum er talan um fiskasløg, sum vóru fullkomiliga ókend, og sum vísindin ikki hevur funnið aðrastaðni fyrr.

Bara fimm av fiskasløgunum eru arktisk, sum er felagsheitið fyri tey fiskasløgini, sum bara halda til í køldum sjógvi norðan fyri ryggin millum Grønland og Kanada og norðan fyri ryggin millum Grønland og Ísland. Í øllum hinum førunum er talan um fiskasløg, sum trívast best í heldur heitari sjógvi.

Tey flestu fiskasløgini, sum eru skrásett fyri fyrstu ferð, halda til á djúpum vatni frá 200 favnum og niðureftir. Millum annað er talan um eitt hávaslag, sum er vanligt í íslendskum sjógvi, og eitt portugisiskt hávaslag. Peter Rask Møller heldur, at tað eru helst djúpvatnstrolarar ella fiskirannsóknarskip, sum hava fingið hesi bæði sløgini.

Spurdur, um tey "nýggju" fiskasløgini verða verandi í grønlendskum sjógvi, og um tey fara at menna seg so mikið, at tað fer at bera til at fiska tey, svarar kanningarleiðarin, at tað kann eingin siga enn.

# Páll Finnur Páll á Summar Festival

**Ársins føroyski tónleikabólkur fer at spæla á Summar Festivalinum í august**

TÓNLEIKUR
*Tíðindaskriv*

Teir eru nakað heilt serligt í føroyskum tónleiki – Páll Finnur Páll. Bólkurin við teimum stuttligu og argandi tekstunum hevur seinasta árið ment seg til at verða ein av bestu livebólkum í landinum – og teirra framførslur eru sum ein dansur í sauna.

Páll Finnur Páll hava nú fleiri ár á baki. Teir komu við fyrstu útgávuni í 2003, og síðani hava teir givið fleiri fløgur út. Í summar kom fløgupakkin Du Ved, At Gjørt Er Gjørt, har allar tríggjar studiofløgurnar umframt ein framúr góð live-fløga eru í sama húsa. Hendan fløgan mundi verða millum best seljandi fløgurnar í Føroyum í fjør, og ikki minst sangirnir á live-fløguni hava verið nógv at hoyrt í føroyskum útvarpi.

Páll Finnur Páll vóru á Planet Awards 2009 heiðraðir sum ársins tónleikabólkur í Føroyum.

Á palli eru Páll Finnur Páll bara blivnir betur og betur. Teir hava í fleiri ár spælt á Summar Festivalinum, og í fjør var ein av minniligastu framførslunum á festivalinum júst løtan við Páll Finnur Páll í Flagstjaldinum. Men samstundis sum Summar Festivalurin kunnger Páll Finnur Páll á ársins festivali, er tað greitt, at bólkurin fer at spæla náttarkonsert á stóra palli á Vágsbø í ár.